Nr. 114/2019

Heðin Mortensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur viðvíkjandi tiltøkum at styrkja Suðuroynna, settur løgmanni, Bárði á Steig Nielsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvørji tiltøk ætlar landsstýrið at seta í verk til tess at venda gongdini í fólkatalinum í Suðuroynni?
2. Metir løgmaður, at hetta at seta gongd á Suðuroyartunnilin hevði verið eitt týdningarmikið átak í hesum høpi?
3. Um so er, nær ætlar løgmaður, at farast skal undir at gera Suðuroyartunnilin?

Viðmerkingar:
Nýggjastu tølini frá Hagstovuni vísa, at sjálvt nú í góðum tíðum veksur fólkatalið í Suðuroynni ikki. Vøkstur er í øllum hinum høvuðsøkjunum í landinum, so úrslitið er, at í dag búgva einans 8,8 % av fólkinum í Suðuroynni, meðan 13 % búðu har í 1985. [1]
Hyggja vit eftir aldurs- og kynssamansetingini, eru útlitini enn daprari. Glottar eru tó summastaðni í oynni, har gongdin ikki er so galin, og einstøk stór arbeiðspláss eru løgst aftrat.
Skal fólkatalið og vinnugrundarlagið styrkjast, er tað helst neyðugt, at landið hjálpir til við miðvísum átøkum; bæði til at stuðla undir ítøkiliga menning og til at birta størri áræði og broyta ímyndina av Suðuroynni.
Avmarkaðu og kostnaðarmiklu flutningsmøguleikarnir eru ofta lýstir sum ein stór avbjóðing í sambandi við trivnaðin í Suðuroynni. Ein Suðuroyartunnil hevði bøtt munandi um hesi viðurskifti. Tí er tað viðkomandi hjá løgmanni at boða fólki og vinnu frá, um ætlanin er at fara undir at gera Suðuroyartunnil. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 22. juni 2020

Heðin Mortensen

[1] https://hagstova.fo/fo/tidindi/fólkatalið-nærkast-52500